TING-HELLAN

# Eg var mær og vitjaði

**Føroyingar kunnu aftur brúka fyrimunin at vera eftirbátur til at læra av royndum og mistøkum hjá øðrum. Eitt tað mest sambærliga økið at hyggja at er býurin Akureyri**

TINGHELLUANALYSAN
*Kári á Rógvi*
*kari_law@post.olivant.fo*





"Háskóli Akureyrar hevur bjargað býnum!" So avgjørd vóru fleiri eg tosaði um universitetið har norðuri í Íslandi. Nýggja tíðin í Íslandi hevur ført við sær, at fólkið leitar av bygdunum til miðstaðarøkið, og landið Ísland er um at gerast býar-staturin Reykjavík. Men á Akureyri hava tey vent gongdini so mikið, at fólk nú leita sær úr óstøðuga veðurlagnum í Reykjavík norður í fastlandsklimaið í gamla keypstaðnum. Tað eru ikki bert góðveður og alskyns mentunartiltøk, ið lokka; tey har norði hava bygt upp lærdan háskúla við mongum forvitnisligum tiltøkum.

Fyrstu ferð eg vitjaði háskólan á Akureyri - einum býi nett upp á støðd við Havnina - viltist eg. Heldur enn at fara inn í undirvísingarbygningin var eg av misgáum fyrin inn í tann stóra og stásiliga granskingardepilin. Uppi á heygnum Sólborg liggur granskingardepilin lið um lið við part av háskúlanum við sínum umleið 1.600 lesandi. Í deplinum er mangir stovnar, ið fáast við gransking ella vitanarvinnu av ymsum slagi, ið tykjast hava sera gott samstarv við sjálvan háskúlan.

**...og hann bendi á tað land, sum hann nú hevur bygt!**

Nú var eg komin at undirvísa í trígjar vikur, og skjótt kom eg í samband við hetta spennandi umhvørvið. Ikki meir enn hevði eg havt fyrsta tíman, so vóru boð eftir mær at vitja á deplinum. Millum stovnana í deplinum var jafnréttistofan (javnstøðustovan), ið fæst við at granska spurningar um javnstøðu og onnur mál í tí høpi.





Millum annað var eg við til framløgu um kanning, sum var gjørd av umstøðunum hjá fólki, ið ferðast í Íslandi, at sleppa fram at góðum umstøðum at skifta á børnum. Íslendigar eru samdir um, at kallmenn og kvennmenn skulu vera jøvn í metum, og bæði pápar og mammur skulu taka sítt tørn at ansa børnum. Men eitt eru mál og mið, annað eru umstøður og møguleikar. Javnstøðustovan hevur kannað mangar slíkar spurningar, og hesu ferð høvdu tey so fingið fólk av háskúlanum at kanna kring landsvegakervið í Íslandi kringumstøðurnar hjá foreldrunum við smábørnum.

Kanningin vísti, at mangan var sera langt ímillum alment atkomilig wc og slíkt, men serliga var tað trupult hjá pápunum at koma framat. Upp í hálvt sjeynda hundrað kilometrar skuldu teir koyra við hvørt. Orsøkin var einføld. Umstøðurnar at sleppa at skifta á børnunum vóru sum oftast skipaðar á wc'num fyri kvinnur.

Frágreiðingin var væl skrivað og sera humoristisk, talan var ikki um róp um kúgan og stríð, uttan heldur tann faktiska og praktiska tilgongdin, sum eyðkennir íslendingar so nógv. Semja er um javnstøðu, hetta krevur fortreytir fyri at foreldur kunnu skiftast um skyldurnar, hesir fortreytir kunnu mátast og vigast - og so gera vit tað!

**...at tað verður eitt bál**

Nú skal lesarin ikki misfata meg, sjálvsagt er henda kanning er ikki størsta gjøgnumbrot í íslenskari gransking. Kanningin og framløgan av henni var bert eitt av ótrúliga nógvum spennandi, ið er at fara til og fylgja við hjá systkinatjóð okkara fyri vestan. Bara ein tilvildarligan dag á Háskóla Íslands í Reykjavík, har eg starvist part av árinum, var eg til framløgu av árligu "Human Develepment Report" frá einum ST-stovni, sum íslenskir granskarar innan fleiri ymiskt fakøki høvdu lisið og nú løgdu fram og viðmerktu til. Sama dag var tiltak, har verkfrøðideildin greiddi frá um skaðarnar av vatnflóð í New Orleans. Dagliga koma boð um framløgur og fundir um evni av øllum handa slagi, innlensk sum útlensk, almenn sum vinnulig. Millum teir mongu áhugaverdu fyrilestrarnar í ár var ein hjá bretskum professara um sáttmálan um Svalbard, ið settu stór spurnartekin norsku atferðina í tí økinum. Á henda hátt duga íslendingar at benda gransking um altjóða viðurskifti inn á landsins og vinnunar áhugamál og fortreytir.

Norði á Akureyri var eg umframt at vitja fleiri ferðir á hesi javnstøðustovu at fáa íblástur til javnstøðuarbeiði í Føroyum við til fleiri fyrilestrar og kjakfundir innan fakøki mítt, løgkunnleikan. Harímillum varð - fyri aðru ferð á Akureyri - skipað fyri fundi um arbeiðið at smíða føroyska stjórnarskipan. Íslensk frøðifólk hava stóran áhuga fyri stjórnarsmíði okkara, ikki minst tí tey eru farin undir at endurskoða íslensku stjórnarskránna. Eisini íslensku bløðini skriva um arbeiði okkara og bera saman tilgongdirnar.

Tað tykist mær sum hvør leggur sín neista til hin sama eld. Sjálvsagt hevur Ísland sínar trupulleikar at dragast við. Fiskivinnan er skroypilig eins og okkara, og keyp av útlenskum